sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

**Taliráðgevi til Sernám**

Søkt verður eftir einum taliráðgeva til barsilsfarloyvissstarv 30 tímar at byrja 1. apríl 2020 ella skjótast eftir tað.

Arbeiðsøkið hjá Sernámi er um alt landið, og hetta starvið er í løtuni knýtt til toymi, sum hevur Tórshavn, Norðstreymoy og Vágar.

**Høvuðsuppgávan í starvinum eru:**

- At veita ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk og foreldur
- At kanna og viðgera børn við talitrupulleikum í og undir skúlaaldur
- At skipa fyri fyribyrgjandi tiltøkum innan talu og málmenning
- At menna sernámsfrøðiliga virksemið í dagstovnum og  skúlum

**Arbeiðsøkið er stórt og fjølbroytt við nógvum samskifti við starvsfólk, leiðslur, avvarðandi og aðrar viðkomandi stovnar, og tí vænta vit, at umsøkjari:**

- Hevur førleika  at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum
- Hevur áhuga fyri avbjóðingum, og er fúsur at royna nýggjar leiðir
- Dugir væl at skapa álit
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og hevur góð samstarvsevni
- Trívist við at samstarva við skiftandi fakbólkar

**Vit bjóða:**

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- Eitt fakligt/tvørfakligt og sernámsfrøðiligt mennandi umhvørvi
- Førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum audiologopedur, lærari ella námsfrøðingur við eftirútbúgving innan logopedi ella samsvarandi.

**Setanartreytir til starvið:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Margreth Olsen, stjóra, á telefon 360 200 ella í teldubrævi til margreth@sernam.fo.

SERNÁM
Á FRÆLSINUM 32 . POSTRÚM 2036 . FO-110 TÓRSHAVN .  TLF 360200 . FAX 310196 . SERNAM@SERNAM.FO . WWW.SERNAM.FO

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. mars 2021 og skulu sendast til:

**Sernám**
**á Frælsinum**
**Postboks 2036**
**FO-110 Tórshavn**
**ella sum teldubræv til** sernam@sernam.fo

*Sernám veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving og vegleiðing, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kropsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning. Í løtuni er Sernám í eini broytingartilgongd, og tann, ið settur verður, má vera sinnaður at luttaka virkin í hesi tilgongd umframt tola broytingar í starvinum.*